TILTØK

Rhema á Hálsi
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P kids. Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti, Eyðun Jacobsen luttekur við sangi og talu. Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit. Vit biðja rósukrans hjá Erlu Simonsen í Signabø fríggjakvøldið kl. 19.30. Øll eru vælkomin. Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit. Sunnudagin kl. 11 hámessa og barnadópur v/Benny Blumensaat í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Sangbrøðrum. Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Lív og Hans Clementsen, Onnugøta 7. Øll eru vælkomin.

Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10 barnabíblutími og bíbliugranskíng. Evni: Kvinnur í skriftini, kl. 11 gudstænasta, Robert Svendsen. Felags døgurði eftir gudstænastuna.

Ebenezer
Fríggjakvøldið kl. 20 ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, kl. 21 útímøti.

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 møti – Missión í Havn.

Rhema á Hálsi
Mikukvøldið kl. 20 evangeliskt møti. Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P. kids. Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli.

KFUM og KFUK í Havn
Fríggjakvøldið kl. 20 í KFUM: Opið hús fyri ung.

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 21 ungdómsmøti, í morgin kl. 17 landsbøn. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við luttøku úr Pinsameinigheitini í Århus, kl. 18 kvøldmøti við Frank Jacobsen, kl. 22 útímøti við Samkomuni í Hoyvík. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Leygardagin kl. 11 útímøti. Sunnudagin kl. 11 møti, majorarnir Turid og Knut Gamst, kl. 18 møti (Fráfaringarløta fyri major Inger Sofie Tjåland), majorarnir Turid og Knut Gamst.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

Samkoman Immanuel
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Heimasíða okkara: www.koma.fo

Norðstreymoy
Aglow fundur verður í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið 23. juni kl. 20. Allar kvinnur og menn hjartaliga vælkomin.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti. Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

Vestmanna Missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Niels Jacob Nielsen, trúboðara.

Útímøti
Heimamissiónin hevur útímøti fríggjakvøldið kl. 19 í Leynum og kl. 21 í Kvívík við sangbólkinum Gittit o.ø.

Filadelfia, Sundalagið
Sunnukvøldið kl. 18 kvøldmøti v/ Sonna Djurhuus.

Ørkin, Saltangará
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini, Saltangará, við Fritór Debes. Húsmøti verður týskvøldið kl. 19 hjá Maybritt og Trúgva Berg, Søldafjørður. Verið hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Sunnudagin kl. 22 ungdómskvøld. Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Maibritt og Súsonnu. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við Paula Høj. Barnamøti kl. 11. Um viðrar, verður farið samkomuútferð við morgunmøti sunnudagin. Havið okkurt drekkandi við sjálvi. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Soli Deo Gloria
Fríggjakvøldið kl. 21 Opið hús. Leygarkvøldið kl. 20 møti. Sunnukvøldið kl. 18 møti, Anfinn Eliasen og vinfólk úr Århus eru við til øll trý møtini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Aglow, Klaksvík
Møti verður í Bøgøtu 3 fríggjakvøldið 22. juni kl. 20, allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnukvøldið kl. 19 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 13-15.00 á tlf. 212380.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 18. juni:
kl. 9.45-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-15 Seyma føroyskar fýrkantar saman til teppir
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikudagin tlf. 316491
Týsdagin 19. juni:
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Myndir frá Suðuroyatúrinum
Mikudagin 20. juni:
kl. 10-12 Fyrireiking til døgurðan
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur út á náttúrugripasavnið
Hósdagin 21. juni:
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 22. juni:
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Vága Gongufelag
Um viðrar verður útferð til Mykinesar sunnudagin 24.06. kl. 10.30 av Sørvági. Havið góð gonguklæðir við. Tilmelding er neyðug, prísur fæst við tilmelding. Ferðavinnan í Vágum, tlf. 333455/213455.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundir verða í kvøld kl. 20–21 og 22.30-23.30.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn. Teldupostur: fhf@craft.fo Heimasíða: www.craft.fo Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International
Føroya deild Tinghúsvegur 18, 4. hædd Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn
uttanlands, tlf. 21 04 95. Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

MBF-skrivstovan
Íslandsvegur 10c Tlf. 317373 · Fax 310813 e-mail: mbf@post.olivant.fo Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373

Javni
Skrivstovan er stongd yvera summarfrí. Ringjast kann til ein av nevndarlimunum.
Eirikur Dam, tlf. 422087
Jógvan Elias á Løgmansbø, tlf. 317686
Jarvin Feilberg Hansen, tlf. 320237
Malena Arnholdsdóttir, tlf. 441395
Diana í Puntabyrgi, tlf. 316510 – fax 310557
email: punta@post.olivant.fo

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir. Tlf./fax 312098 Teldupostur: far_cuba@hotmail.com Viðtala eftir avtalu.

Giktafelag Føroya
Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini. Lýst verður tá opið verður aftur.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Beinta tlf. 310574 Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063 110 Tórshavn. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo Tlf. 315928, Odny Tlf. 315786, Karin Elisa Tlf. 315673, Katrin

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið Íslandsvegur 10c Tlf./fax 311419 Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir. Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30 Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27. E-mail: ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík
Møtini byrjaðu 1. oktober kl. 16 og verða hesa klokkutíð allan veturin.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25, 6700 Esbjerg, tlf. 75132747 Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C. Tlf.: 25395563 Teldupostur: ffo@post.gs www.ffo.subnet.dk

Føroyingafelagið við fjørðin
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A 1620 København V Tlf. 33239980 Fax: 33239234 Teldupostur: fo.raadgivning@get2net.dk Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt (donsk tíð).

Føroyingafelagið í Århus
Vestergade 48D 8000 Århus C Tel. 86 18 06 04 Húsið er opið mánadag til hósdag kl. 16-18 og fríggjakvøld kl. 21-03. Føroysku bløðini liggja frammi. Kaffi er ókeypis. Flogbóltur í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16-18. Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30. Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag (ólíka vikur) frá kl. 11-14.

Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyingafelagið í Svøríki
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á tlf. +468853570

Føroyskt barnamøti
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

GULLBRÚDLEYP

Leygardagin 23. juni kunnu hjúnini Hallgerð og Frits Jacobsen í Sørvági halda gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

FILMSTEIGURIN

Spinn eiturkopsins

Dr. Alex Cross leggur løgreglukeltið á hillina eftir at felagi hansara er deyður. Hann var nýttur sum lokkimatur fyri ein seriudrápsmann. Hann vil ikki longur fáast við at analysera sjúkar heilar fyri at finna fram til, hvørjum drápsmaðurin fer at leggja eftir næstu ferð.

Men hann hevur einki val!

Tá Gary Soneji við hepni hevur flutt burtur dóttir Roses, senator, Megan, frá einum annars sera væl tryggjaðum skúla, velur hann at seta seg í samband við Cross. Móti sínum vilja letur hann seg lokka, tí tað er greitt, at tað eru ikki pengarnir, ið hava áhuga hjá burturflytaranum, men vitgitnin. Hann vil hava ein mótstøðumann, sum kann seta virði á netið, hann hevur spunnið um offur síni.

Men harvið fær hann eisini ein mótstøðumann, sum júst kann lesa næstu stig hansara…

Saman við Secret Service agentinum Jezzie Flannigan, sum hevði ábyrgdina av Megan, sær hann eitt mynstur og tí klárar hann at vera á rætta stað røttu tíð, tá Soneji slær til aftur – móti soni russiska sendimansins. Men hóast Cross og Flannigan harvið bjarga eini altjóða kreppu, er sakin ikki endað. Sonjei er enn frælsur og hevur Megan um gísla – og hevur framvegis ætlan um at gerast heimsgitin…!

Menn við æru

»Men of Honor« sigur sonnu og rørandi søguna um Carl Brashear – tann fyrsta djúphavskavaran í amerikanska flotanum – og hansara tornulagda veg gjøgnum eina beinharða fordómsfulla skipan, sum á ongan hátt vil vita av honum, og sum er klár til hvat sum helst fyri at sleppa av við hann.

Carl Brashear (Cuba Gooding, JR) er sonur ein sera fátækan bónda í Kentucky, og tá hann skræðir seg leysan frá barnaheiminum fyri at fara í tænastu í flotanum, sum í kjalarvatninum av øðrum heimsbardaga nú eisini tekur svartar menn inn, fær hann hesi ráðini frá pápanum:

– Tú mást ongantíð geva upp… ver tann besti!

Og hesi ráðini tekur Carl til sín – saman við tí primitiva radionum, sum pápin gevur honum, tá hann fer.

Á kavaraskúlanum rennir Carl saman við Billy Sunday (Robert De Niro) – sum er ein íðin og óstýriligur Master Chief Navy Diver, sum leiðir beisku venjingina, sum bara tríggir av tólv kandidatum koma ígjøgnum. Men hóast Sunday – eftir ordrum frá leiðsluni – ger alt fyri at forskrekkja og knekka Carl, gjøgnumførir hann við ókúgiligum treiskni venjingina, og endar hann við at bestanda og gerast partur av amerikanska flotanum.

Endamálið við kavaraliðnum er at fara út til bjargingaruppgávur og at heinta persónar og lutir upp av havsins botni, m. a. frá skipum, sum eru ging in í burtur og flogførum, sum eru dottin í havið, og tað er eitt arbeiði undir viðurskiftum, har tann minsti feilurin kann verða fatalur!

Nógv ár seinni endar galið hjá Carl Brashear. Undir eini bjargingaruppgávu kenur hann út fyri eini vanlukku, sum kostar honum annað beinið. Men hann er treiskur og uppsettur upp á at halda fram sum kavari, hóast hann nú hevur »træbein«. Enn einaferð má hann stríðast við eina skipan, sum fyri ein hvønn prís vil forskrekkja hann, og sum helst vil, at hann fer upp á pensjón. Og er fær hann nú ein óventaðan liðfelaga í gomlu »óndu ondini«, Billy Sunday…



Frumsýning
Fríggjadagin 22.06. kl. 23[30] Leygardagin 23.06. kl. 23[30]
Sunnudagin 24.06. kl. 22[30]

www.in.fo/havnarbio

HAVNAR BIO
Tlf. 3119 56



Frumsýning
Fríggjadagin 22.06. kl. 20[45] Leygardagin 23.06. kl. 20[45]
Sunnudagin 24.06. kl. 19[45]

Fríggjadagin 22.06. kl. 23[30] Leygardagin 23.06. kl. 23[30]
Sunnudagin 24.06. kl. 22[30]

Fríggjadagin 22.06. kl. 20[30] Leygardagin 23.06. kl. 20[30]
Sunnudagin 24.06. kl. 19[30]